# ki inn um hurðina

### Gávur til útlandið

Jólasølan hevur lutir til øll. Hon er fyri øll, og tey eru ikki so fá, sum gera av at fara. Jórun metir, at um 1.800 til 2.000 fólk vitjaðu í ítróttarhøllini tann hálvanannan dagin, sølan vardi.

Jórun hevur ikki nakað tal á, hvussu nógv varð selt fyri, men hon veit, at tað gekk væl at selja. Mong eru tey, ið nýta høvi til at keypa jólagávur, og fleiri av teimum fara helst til føroyingar, sum búgva uttanlanda. Tað er jú ongin ivi um, at føroyskt handverk er ein vøkur gáva, og góðskan man vera á einum høgum støði.

Jórun greiðir frá, at í dag verður ikki spurt eftir prísinum, tá fólk keypa tær handgjørdu vørurnar.

– Tað er in at keypa handgjørdar vørur í dag, og tí er tað so hugaligt hjá øllum, ið hava hug at skapa at gera tað, tí tað er ongin ivi um, at arbeiðið, sum liggur aftanfyri, er stórt, heldur Jórun Vang.



*Hon fegnast um fittu nissurnar*



*Børnini upplivdu jólahugna í høllini*

### Nýggir limir

Fyri 12 árum síðani var árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag ikki nakað stórt tiltak. Í dag er hon vorðin rættiliga stór, og Jórun er greið yvir, at hon kann fara at verða upp aftur størri næsta ár.

Hon er rættiliga errin av, at so mong fólk teknaðu seg til í ár, og tað at tey komu allastaðnis frá í landinum, gjørdi tað bara enn betur.

– Nú er tað gevandi at arbeiða við hesum. Fleiri nýggj hava teknað seg sum lim, og tað ger alt nógv meira hugaligt. Fyrr høvdu vit nóg illa ráð at lýsa við tiltakinum, greiðir Jórun smáflennandi frá.

Jólasølan er vorðin ein siður í dag, sum fólk meiri ella minni bíða eftir. Og tað fegnast hon stórliga um.



*Nógvir lutir vóru á jólasøluni*

### Enn fleiri næsta ár

Sum nevnt væntar Jórun, at luttøkan komandi ár verður upp aftur størri. Hetta og mangt annað fara tey at taka upp á eftirmetingarfundi um stutta tíð.

Eisini er felagið farið at hugsa um søluna komandi ár, tí nógv er at tilrættisleggja, og tað krevst at vera í góðari tíð.

– Tað skal vera pláss fyri øllum, slær hon fast.

Jórun letur væl at viðurskiftunum í høllini á Hálsi. Parkeringsviðurskiftini eru góð og har er gott pláss inni.

– Høllin á Hálsi er vælegnað til jólasøluna hjá okkum, og vit hava longu sett hana av til komandi ár.

Tá tað vóru mest básar í Gundadalshøllini vóru teir 34 í tali, og tá var smekkfult. Á Hálsi vóru sum sagt 56, men Jórun hevur góðar vónir um at fáa pláss fyri fleiri, um tað skal vera. Tað er eisini vanligt, at fleiri eru um ein bás. Tað gevur sjálvandi pláss fyri enn fleiri luttakarum.

Hvussu nógvir handgjørdir lutir mundu vera inni í ítróttarhøllini á Hálsi fyri tveimum vikum síðani, dugir Jórun als ikki at meta um. Men hon ivast ikki, tá hon sigur:

» Skapanargleði er so góð fyri fólk, og hon trívist væl í Føroyum. Tað ivast tú ikki í aftan á at hava verið til jólasøluna hjá okkum. «

### Á fíggjarlógina

Hennara vón er, at við vaksandi áhuganum fyri jólasøluni, fara eyguni hjá politikarunum at latast upp fyri føroyska handverkinum, og týdninginum av at varðveita og menna tað.

Hon vísir á, at bæði í Danmark, Íslandi og Svøríki er tað ein sjálvfylgja, at tey, ið skapa handverkið, eru á fíggjarlógini, og tí hevði hon viljað, at tað sama var galdandi í Føroyum.

– Ynskið hjá Heimavirkisfelagnum er, at kunna havt eini høli og eitt starvsfólk í hálvtíðarstarvi. So hevði tað verið gott og mennandi. Í útlandinum ber til at liva av hesum, og føroyska handverkið stendur sum sagt onki aftan fyri tað útlendska, so við røttu karmunum, hevði tað ivaleyst eisini borið til herheima, ivast Jórun Vang ikki í.





*Jóannes hevði skift út rósurnar við jóladekoratiónir*